## Dansiskeið við Vígdis

Nú kunnu øll dansiáhugaði gleða seg, tí dansiskeið verður í Havn og í Klaksvík í summar við Vígdis Hentze Olsen. Umframt Vígdis, undirvísa dansarararnar Tine og Sarah eisini í skeiðnum, ið verður hildið miðjan juli mána. Undirvíst verður m.a. í lyrisk street jazz, house og hip hop. Til ber at lesa um Tine á myspace. com/funkytorso og um Sarah á myspace. com/sallllla



## Sandoyingar fækkast

Afturgongdin við fólkatalinum á Sandoy heldur fram, 1. mai vóru sandoyingarnir 1373 í tali. Higartil í ár er fólkatalið á Sandoy minkað við 10 fólkum, ella ein minking í % uppá 0,8. Tað er bara Húsavík, har fólkatalið er økt, men økingin er bara 1 fólk. Í Dali og á Skarvanesi er eingin broyting higartil í ár. Størsta afturgongdin er í Skálavík, har er afturgongdin 6 fólk, men eisini á Sandi og í Skopun er afturgongd - við ávikavíst 3 og 2 fólkum. 1. mai búðu 1373 fólk á Sandoy.



*Maru Seafood hevur rikið trý virkir, Kósina, Eystís, sum er gamla Roykivirkið í Klaksvík og Norðís á Eiði. Virksemið á Eystís er hildið uppat. Tey átta skipini seks ísfiskatrolarar, Navarin, Borgarin, Nónhamar, Fjalshamar, Safir og Smaragd. Línuskipini eru Grani og Fugltúgvan*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

seinastu tíðina hevur fiskiskapurin verið ógvuliga smáligur, og tí hava ikki øll skipini, sum felagið rekur, verið í vinnu. Tað hevur loyst seg betri fyri skipini at ligið við bryggju.

- Men eitt par fór út herfyri, og eitt par fór útaftur týsdagin.

Stjórin sigur, at støðan hjá felagnum er soleiðis vorðin, at neyðugt er at taka støðu – túr fyri túr – nær loyst verður. Hetta er heldur ikki haldbart í longdini.

- Hetta er ein tíð, har prísirnir á olju bara eru hækkaðir, og man hevur ikki møguleikan at staðfesta, hvør gongdin verður við prísunum. Tí er hetta ein støða, sum verður tikin – frá degi til dags, sigur stjórin.

Hvør verður tín boðskapur til eigararnar og kreditторarnar á komandi aðalfundi?

- Tað verður sami boðskapur, sum vit hava havt í eina tíð. Vit mugu finna út av, hvat er at gera, og hvussu vit kunnu skipa so fyri, at líkindi gevast fyri eini lønandi drift. Í løtuni skal nógv til, bæði frá kreditторum og teimum, sum fíggja okkum – umframt frá parteigarunum.

### Nýggjur partapeningur

Jóhan Páll Joensen avvísir ikki, at tað kann gerast neyðugt hjá felagnum at tekna meira partapening í samtakinum.

- Hvørji útliti eru, dugi eg slett ikki at meta um, men sum støðan er í dag, eru útlitini at tekna meira partapening ikki góð.

Stjórin heldur, at spurningurin um nýggjan partapening skal takast upp í heyst.

- Neyðugt verður fyrst at síggja, hvar oljuprísirnir enda, eins og neyðugt verður at finna út av, hvussu verður við fiskidøgunum hjá okkara parti av flotanum, sigur Jóhan Páll Joensen.

---

lokala umhvørvinum?

Tey, sum standa aftanfyri kabarettina á Eystanstevnu, siga, at kabarettin er á tremur við aktuellum søgum úr býnum, eins og fleiri skemtiligir táttir eisini verða á skránni.

- Kabarettin er stuttligari enn nakrantíð, nú hon verður spæld fyri sjeyndu ferð í fimleikarhøllini í Glyvra skúla.

Tað siga tey, sum hava fingið ein "smakk" av henni undir venjingunum, sum verið hava.

Leikarar, sum hesaferð koma at standa fyri skemti og sangi, eru eitt nú Hallur Hansen, Kenneth Rasmussen, Jonhard Hansen, John Andersen, Dia Davidsen, Jóannes Djurhuus, Jórun á Líknagøtu og Anna Olsen.

Teir, sum standa fyri tónleikinum, eru Hjalti Joensen, Jákup Olsen, John Mortensen og Jóhan á Lakjuni.

Stigtakararnir lova, at tey, sum vitja kabarettina hesaferð, fara flennandi allan vegin heimaftur til húsa.

Sýningarnar verða fríggjakvøldið klokkan 21 og mánakvøldið klokkan 20.

---



*Tilsamans 48 fólk vóru umborð á seismikkskipinum Atlantic Explorer, tá eldur kom í skipið seinnapartin í gjár*

# Thor-skip tók fólk av brennandi skipi

**- Vit hava verið í samband við Thor Provider og hava skilt, at tað gekk væl at taka manningina av seismikkskipinum. Støðan umborð á Atlantic Explorer er undir eftirliti, og øll manningin hevur tað gott, siga tey hjá Thor í Hósvík**

BJARGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Umknapt 17-tíðina seinnapartin í gjár kom eldur í seismikkskipið, Atlantic Explorer, sum tá var á leiðini norðanfyri Senja í Troms.

Eldurin tók seg upp í maskinrúminum, men tað eydnaðist trygdarmanningini við sjálvvirkandi sløkking, sum skipið hevur, at basa eldinum.

Sambært norsku heimasíðuni www.ba.no (Bergens Avis), byrjaði eldurin í einum hjálpimotori í maskinrúminum, og um 20-tíðina í gjárkvøldið varð hann sløktur.

Føroyska support-skipið hjá Atlantic Explorer, Thor Provider, sum Thor í Hósvík eigur, tók meginpartin av manningini av seismikkskipinum. Manningin telir 48 fólk, harav trygdarmanningin var eftir umborð til at basa eldinum.

Eingin fekk skaða undir tilburðinum.

### Thor váttar

Reiðaríið Thor í Hósvík váttar, at skipið hjá teimum seinnapartin í gjár tók ein stóran part av manningini av Atlantic Explorer.

- Vit hava verið í samband við Thor Provider og hava skilt, at tað gekk væl at taka manningina av seismikkskipinum. Vit eru chartraðir av altjóða seismikkfelagnum PGS, sum ger seismiskar kanningar við Atlantic Explorer.

Hjá Thor í Hósvík siga tey, at einir 5-6 mans vanliga eru við Thor Provider, og yvirmenninir eru føroyingar.



*Allir yvirmenninir umborð á Thor Provider, sum tók meginpartin av manningini av Atlantic Explorer í gjár, eru føroyingar*

- Vit hava skilt, at støðan umborð á Atlantic Explorer er undir eftirliti, og øll manningin hevur tað gott.

Thor í Hósvík sigur, at uppgávan hjá Thor Provider er at sigla við útgerð til stóra seismikkskipið.

### Ikki umfatandi

Sambært norsku heimasíðuni hevur eldurin umborð á Atlantic Explorer ikki ført til, at olja er likin í havið, og eingin dálking er farin fram á umhvørvið í økinum.

Sum skilst, er skaðin, ið skipið hevur fingið av eldinum, heldur ikki so umfatandi.

Sambært heimasíðuni er tað Petroleum Geo-Services, sum eigur Atlantic Explorer.